Ein javnaðarmaður, sum tekur undir við fullveldi. Jógvan Mørkøre í Hósvík finst harðliga at andstøðupolitikki Javnaðarfloksins.

Flokk

FULLVELDI. Jógvan Mørkøre, bygdarráðsformaður í Hósvík umhugar, um hann framvegis skal vera í Javnaðarflokkinum. Sambandssinnaðu kósina hjá flokkinum heldur hann vera eina so ógvusliga kollvelting, at hann mælir sambandssinnaða vonginum at leggja saman við Sambandsflokkinum

Høgni Mohr
Myndir: Jens Kristian Vang

Jógvan Mørkøre í Hósvík er javnaðarmaður. Men hann tekur als ikki undir við leiðsluni í flokkinum, sum saman við Sambandsflokkinum vil varðveita heimastýrið.

Tá ið Jóannes Eidesgaard og Edmund Joensen standa øksl móti øksl í bardaganum fyri ríkisfelgsskapinum, fara tankar Jógvans Mørkøre aftur til ta tíðina, tá ið Javnaðarflokkurin og Sambandsflokkurin vóru í samgongu.

– Eg minnist tá ið Jóannes Eidesgaard kallaði til fundar í skundi ein sunnudag, tí hann ikki vildi sita í rúmi saman við Edmundi meira. Ta ferðina tá ið Edmund fór av landinum og ikki segði Jóannesi frá, at hann var uttanlands, sigur Jógvan Mørkøre, sum undrast stórliga yvir, at formaður Javnaðarfloksins nú kann standa undir liðini á sambandinum.

- Antin er okkurt heilt ullint við hesum, ella eru teir vorðnir so sannførandi frelstir, at teir nú eru samdir. Her er ikki rætt. Teir, sum ikki kundu semjast tá, klára tað neyvan longur enn eitt ár í hesum føri, spáar Jógvan Mørkøre.

Køvdar grasrøtur

Sambært Jógvan Mørkøre fór Javnaðarflokkurin á val fyri tveimum árum síðani við einum lyfti um ríkisrættarligar broytingar. Javnaðarflokkurin í Norðurstreymoy hevði eitt gott val, men orrusturnar vóru so harðligar í flokkinum, at Jógvan valdi at siga seg úr økisnevndini í flokkinum.

– Eg hevði lagt stórt arbeiði í flokkin her norðuri, men tað varð sópað til viks. Nú skuldi eg bara góðtaka harraboð frá Jóannesi Eidesgaard og øðrum høgum persónum um, hvør skuldi vera oddafiskur, minnist Jógvan Mørkøre, sum ikki hevur gloymt tíðina fyrst í nítiárunum, tá ið Javnaðarflokkurin var ein krepparaktur flokkur, sum nógv vendu baki.

– Eg sá, hvussu tey, ið vóru ímóti flokkinum, tá ið ringast stóð til, knappliga við seinasta val aftur vóru ein stórur partur av flokkinum, meðan grasrøturnar vórðu settar til viks. Tí spyrji eg, um flokkurin vil hava tey, sum gera flokkinum mest fortreð, tá ið harðast leikar á, at vera partur av flokkinum, sigur Jógvan Mørkøre og sipar m.a. til Kristian Magnussen, fyrrverandi landsstýrismann hjá fyrrverandi Verkamannafylkingini, sum knappliga aftur gjørdist javnaðarmaður aftur upp undir valið.

Sambandssinnaði Hans Pauli

– Tað var sum søgan um hin burturvilsta sonin, tá ið Kristian varð fingin úr aftur fylkingini, minnist Jógvan Mørkøre, sum sjálvur hevur verið uppstillaður fyri Javnaðarflokkin. Undan valinum í 1994, tá ið Verkamannafylkingin kom inn á ting, minnist Jógvan, hvussu ágrýtin og grammur Hans Pauli Strøm var, tá ið talað varð um, hvussu skeivt Javnaðarflokkurin hevði arbeitt árini áðrenn samfelagið fór á heysin.

Hans Pauli Strøm hevur skrivað rættiliga nógv ímóti fullveldinum í bløðunum. Summi nevna hetta eina ræðuherferð. Hvat heldur tú um hetta hugtakið?

- Eg hoyri til tann partin av Javnaðarflokkin, sum vil hava broytingar. Seinasti javnaðarfundur, eg var á, var suðuri í Havn. Til viðgerðar var bóklingurin hjá Javnaðarflokkinum um ríkisrættarligar broytingar. Vit vóru nøkur sum hildu, at vit føroyingar skuldu taka meira ábyrgd upp á okkum. Og tað samsvarar við tað, sum Jóannes Eidesgaard segði fyri ikki so langari tíð síðan; at ríkisfelagsskapurin er onki *problem*. Men nú er tað, sum millum lív og deyð at halda fast við ríkisfelagsskapin. Hetta er ein so ógvuslig kollvelting, at eg haldi, at hesin vongurin av Javnaðarflokkinum átti at lagt saman við Sambandinum. So hava teir ein stóran Sambandsflokk. So kunnu vit, sum eru broytingarsinnað, vera eftir, mælir Jógvan Mørkøre til.

Politiskt einsamallur

Hvussu hevur tín ónøgd við kósina hjá Javnaðarflokkinum verði móttikin í flokkinum?

- Eg havi valt at latið vera við at gera flokkinum fortreð. Havi staðið á síðulinjuni og eygleitt leikin. Men tá ið Javnaðarflokkurin fer so langt til høgru, og er so samdur við Sambandinum, kann ein spyrja seg sjálvan, hvat ein fer at velja tá ið avtornar. Nú kanst tú akkurát tað sama velja Sambandið, heldur Jógvan.

Men, hvussu kanst tú so kalla teg sjálvan javnaðarmann?

– Tað kann eg, tí Javnaðarflokkurin eigur ikki patentið upp á flokkin. Hetta er ein arbeiðaraflokkur. Eg eri á tí støði, sum ein altjóða linja setir til ein arbeiðaraflokk. Eg eri her, um teir hava tørv á mær. Men tað tykist, sum teir kanska ikki hava brúk fyri mær. Tað er heldur ikki óvanligt, at tú glíðir burtur ímillum. Men tá ið valer, so ert tú nóg góður til at heingja plakatir og annað skrambul upp...

Men kennir tú teg ikki misnýttan?

– Jú, men tað gerst tú javnan í politikki. Summar tíðir sveimar tú, meðan aðrar tíðir ert tú ómetaliga einsmallur.

Ert tú einsamallur í dag?

– Ja, politiskt...

Høgni gingin ov nær

Jógvan Mørkøre er kortini vísur í, at tað kring landið eru fleiri, sum eru fullveldissinnað. Og sum vilja hava samráðingarnar lidnar áðrenn støða verður tikin.

– Hví skal alt skúmast upp um skiftistíðin skal vera fýra ella tíggju ár. Eg sigi, at »Nyrup har sagt saa meget«.

Men føroyski Javnaðarflokkurin hevur jú uttan stórvegis mótmæli tikið undir við hørðu kósini hjá Nyrup?

– Ja, og eg fari at umhugsa, um eg framhaldandi skal vera í Javnaðarflokkinum, sigur Jógvan Mørkøre, sum kundi hugsa sær undir valið. Og nú hevur mann hug at finna út av, at nokk so nógv fólk eru eitt sindur ivingarsom.

Er hugsanin hjá Javnaðarflokkinum: Flokkur fram um land?

– Ja. Men soleiðis er tað kanska í teimum flestu flokkunum í landinum. Hugsað verður ikki, hvat er best fyri fólkið, men hvat er best fyri flokkin. Og tað er líkamikið, hvat teir billa fólki inn upp undir val. At fólkið so hoppar

K@T@-hornið

Nr. 6 · hósdagur 27. apríl 2000 · 74. árgangur

Tíðindablaðið Sosialurin, Postboks 76, 110 Tórshavn, Telefon 311820, Telefax 314720 • **T-postur til KT-hornið**: kthornid@sosialurin.fo • **Lýsingar**: lysing@sosialurin.fo • **Ábyrgdarstjóri**: Jan Müller
Blaðstjórn: Steinbjørn í Dali, Finn Jensen • **Layout og uppseting:** Tíðindablaðið Sosialurin • KT-hornið er fastur táttur í Sosialinum hósdag • Evsta mark fyri lýsingar er mánamorgun kl. 10.00.

Bla›stjórn

Steinbjørn í Dali

Finn Jensen

Aftur stórt kursfall á Microsoft partabrøvum

KT-partabrøvini fullu aftur í gjár, tá ileggjjarar fingu roknskapin hjá Microsoft fyri fyrsta ársfjó›ring í ár. Slaturin um at amerikanski lógmálará›i hevur í umbúna at krevja at Microsoft skal í tvíningar, gjørdi ta› ikki betur.

Ársfjó›ringsroknskapurin hjá Microsoft, sum bleiv almanna kunngjørdur hósdagin, vísir eitt nógv verri úrslit enn vænta, og ta› førdi vi› sær at íleggjarar vildu selja síni partabrøv. Men tí›indi um at amerikanska stjórnin vil vi›mæla at Microsoft fyritøkan ver›ur li›a sundur í tvær fyritøkur, skaddi microsoft partabrøvini enn meira.

Nasdaq-partabrævaindeksi› fall vi› 161.35 stigum ella næstan 5 prosent annan páskadag, me›an Dow-Jones-indeksi› fyri ídna›arpartabrøv hækka›a eitt líti› vet. Nasdaq-indeksi› er nú bert 161 stig omanfyri ta› lægsta í ár.

Microsoft-partabrøvini fullu 16 prosent. Ta› merkir, at vir› á fyritøkuni fall vi› 520 milliardir krónum uppá fáar tímar. Partabrævahandilin var› fira fer›ir vanliga handilin skrivar CNN.com.

Ta› amerkianska lógmálará›i og 19 amerikanskir statir hava bo›a› frá, at teir umhugsa at bi›ja rættin um at b‡ta Microsoft sundur í tvær sjálvstø›ugar fyritøkur. Hetta er ein li›ur í einkarsølu sakarmálinum móti Microsoft. Ta› er tó ikki komin nøkur endalig ni›urstø›a frá lógmálará›num og teim 19 statunum.

Orsøkin til vánaliga roknskapin og at vøksturin í fyritøkuni Microsoft er ste›ga›ur, er at vinnulívi› keypir minni av teldum í løtuni.

Sambært einum talsmanni fyri teimum sum arbei›a ímóti monopolinum hjá Microsoft, fara lógmálará›i og teir 19 statirnir at skjóta upp at Microsoft skal b‡tast sundur og at n‡ggja fyritøkan skal millum anna› selja og menna Office forritini, sum millum anna› eru Word, Excel og Access.

Microsoft partabrøvini eru í ár fallin 44 prosent tilsamans.

sid@sosialurin.fo

Gates vor›in bleytur í knøunum

Stjórin hjá Microsoft, Bill Gates, fer at appellera til hjørtuni hjá amerikumonnum í eini rø› av sjónvarps-l‡singum næstu vikurnar.

Læra at gera heimasí›ur

Skei›tænastan hjá Farodane, Kvasir, heldur skei› fyri teimum, sum vilja læra at gera egnar heimasí›ur

Edvard Joensen

Fram um a›rar skei›útbjó›arar hevur Kvasir tilbo› um web koyrikort og dtp koyrikort.

Sam Jacobsen, skei›lei›ari hjá Farodane, sigur, at vi› web koyrikortinum fæst útbúgving, sum skal til fyri at kunna gera eina heimasí›u. Undirvíst ver›ur í teimum skráum, sum ney›ugar eru í hesum sambandi.

Á heimasí›uni hjá Farodane ber til, undir Kvasir, at lesa meira um tær skráir, sum undirvíst ver›ur í, sigur Sam Jacobsen.

Undirvísingin er í samstarvi við ein danskan skei›útbjó›ara. Mannagongdin er tann, at Kvasir fær skei›tilfari› úr Danmark móti gjaldi og hevur so sínar egnu, førousky undirvísarar.

Hitt tilbo›i›, Kvasir í løtuni hevur fram um a›rar útbjó›arar, er dtp koyrikorti›, sigur Sam Jacobsen. Hetta er skei› í skráum, sum skulu til fyri at gera prentlutir, sigur hann. Men hann leggur dent á, at fólk, sum taka hesi skei›ini, kortini ikki ver›a útbúnir grafikarar av hesum.

Men her ver›ur lagdur dentur á at geva fólki ein førleika at klára tann tørv, sum mangasta›ni vísir seg, nú nógvar fyritøkur og stovnar samskifta nógv vi› l‡singarstovur, blø› og so framvegis. Ta› gerst tí alt meira ney›ugt at útbúgva tey fólkini, sum manna til dømis almennu stovnarnar, at tosa og skilja sama máli›, sum tey á l‡singarstovuni tosa.

Sam Jacobsen sigur, at ta› er greitt, at føroyski marknea›urin veksur. Ta› ver›a alt fleiri, sum gera egnar heimasí›ur. Bæ›i stovnar og fyritøkur. Ney›ugt er hjá teimum, sum manna hesar fyritøkur, at duga at brúka teir møguleikar, sum eru á økinum. Og ta› er júst ta›, Kvasir lærir tey. Ikki bara at byggja upp eina n‡ggja heimasí›u. Men so sanniliga eisini hjá webmastaranum at duga at halda sí›una vi›líka.

Umframt ber sjálvandi eisini til at taka ta› vanliga teldukoyrikorti›, sum allir a›rir veitarar eisini hava.

Her fer kappingin at har›na í framtí›ini, metir Sam Jacobsen. Ta› er soleiðis, sigur hann, at sølufyritøkurnar leggja seg eftir at selja pakkar. Ta› vil siga bæ›i teldu og koyrikort í einum. So ver›ur spurningurin, hvar prísurin fer at lækka. Um ta› ver›ur á maskinuni, ella ta› ver›ur á koyrikortinum.

– Tí kapping plagar at hava príslækking við sær, sigur Sam Jacobsen.

Hann letur hampiliga at undirtøkuni, Kvasir hevur fingi›, sí›an byrja› var›. Tey komu eitt sindur seint í gongd í vár, sigur hann. Og hetta er ikki júst tí›in, tá fólk vilja sita á skei›i. Tí ver›ur meira satsa› upp á heysti› aftur. Ta› eru vanliga fimm luttakarar á hvørjum skei›num. Og líkt er til, sigur Sam Jacobsen, at ney›ugt ver›ur vi› onkrum eyka skei›um.

Sam Jacobsen metir, at kunningartøkni kann gerast ein gó› inntøkukelda hjá føroyingum í framtí›ini. Og teirri útbúgvingini, sum til tess krevst, ætlar Kvasir at eiga part í, sigur hann.

Ta› gongur alt meira tann vegin, at samskifti› ver›ur elektroniskt, og vit ver›a stutt og greitt noydd at fylgja vi›, sigur Sam Jacobsen. Til dømis kunnu føroyingar saktans sita í Føroyum og gera grafiskt arbei›i og heimasí›uarbei›i, sum kann flytast út um Interneti›.

Hann nevnir í hesum sambandi, at pappírsskjøl fara at ver›a skift út vi› pdf filar. Til dømis hava amerikanskir myndgleikar, ES og Kommunernes Landsforening í Danmark gó›kent pdf sum format til skjøl. So tá føroyingar í framtí›ini fara at samrá›ast uttanlands, ver›a tey skjøl, sum sendast skulu ímillum, send sum filar í sta›in fyri pappír.

Hesa gongdina tr‡r hann uppá, sigur Sam Jacobsen, og tí hevur Kvasir eisini skei›, har fólk kunnu læra meira um hetta.



Sam Jacobsen, skei›lei›ari

Kvasir hevur skei› í heimasí›um